VIÐMERKING

Atfinningar at føroysku lærararunum og skúlanum

Eydna Skaale,
Tórshavn

Fyri einum knøppum ári síðani var stórt læraraverkfall. Lærarar kravdu betri umstøður og meira í løn, og til tess at fáa hesar sømdir, løgdu teir skúlan lamnan í fleiri mánaðir.

Tað er í lagi, at lærarar seta krøv til samfelag og myndugleikar.

Men tað hevur við sær, at samfelagið og næmingarnir eisini mugu kunna seta krøv til lærararnar. Og lærarar mugu eisini seta sær sjálvum krøv.

Men tað eru tað langt frá allir, sum gera!

Í Føroyum fara vit í skúla um 7 ára aldur. Tey flestu eru liðug við skúlagongdina í Føroyum um 20 ára aldur, eftir lokna students-ella handilsskúlaútbúgving. Tað vil við øðrum orðum siga, at vit í 13 ár verða eygleidd og mett av ymsum lærarum. Teir gera av, um vit eru eitt 5-tal ella eitt 11-tal. Um vit eru egnað ella ikki.

Men hvør metir um lærararnar? Hvør ger av, um teir eru egnaðir ella ikki?

Á flest øllum arbeiðsplássum verða krøv sett til starvsfólki. Og krøvini vaksa, sum tíðin fer. Lýkur starvsfólkið ikki krøvnini, missa tey arbeiði. Fyri at halda seg ajour, mugu tey á skeið so og so ofta.

Men soleiðis er ikki í landsins skúlum. Tað tykist, sum at lærararnir kunnu týggja sær júst, sum teir vilja. Mong við mær munnu hava upplivað, at lærararin hevur sovið við pultin!

Lærarar fara til endaliga roynd á læraraskúlanum um 25-30 ára aldur og kunnu so arbeiða inntil teir eru 67. Sjálv havi eg gingið 12 av áður nevndu 13 árunum í skúla, og eg haldi, at tað er ófatiligt, hvussu nógvir vánaligir lærararar sleppa at arbeiða. Áttu ikki lærararnir eisini farið upp til royndir ? Ella átti tað at verið lógarásett, at fimta hvørt ár tú arbeiddi sum lærari, skuldi tú ein túr til skips, oman á fiskavirking, í handil ella onkra aðra staðni burtur frá skúlanum ? Nú sigi eg ikki, at allir lærarar eru vánaligir, men tað tykist, sum bróðirparturin av teimum eru ”sovnaðir” eftir nøkur ár í skúlanum.

Tað var einaferð ein gamal danskur lærari, sum segði um sínar ungu starvsfelagar, at tað sá út fyri honum, sum teir hildu, at ”nu har vi fået en uddannelse, og så skal vi sgu ha’ det godt resten af livet” (stóð í einum donskum blað fyrst í 70’unum).

Vit eru ikki øll eins

Tað eru eisini bert teir allar fæstu lærararnir, ið klára/duga at undirvísa øllum flokkinum. Her meini eg við, at í einum vanligum skúlaflokki eru eini 2-3 heilt ljós høvd, tey allarflestu eru meðal og nøkur eru, við einum keðiligum orði, sibbar. Øll eru ikki á sama stigi. Og ein, ið dugir heilt væl í rokning, kann væl vera ”sibbi” í føroyskari fyrisøgn.

Men teir allarflestu lærararnir undirvísa bert ”miðjuna” av flokkinum. Tey framúr góðu og tey vánaligu, verða slept uppá fjall. Tey mugu sum oftast bíða eftir læraranum, tí hann fyrst tekur sær av fjøldini í miðjuni.

”Gud er ikki javnaðarmaður”, verður so ofta sagt. Vit menniskju eru skapt so sera ymisk. Nøkur eru tjúkk, onnur kløn; nøkur reyðhærd, onnur ljóshærd. Summi duga væl at rokna, men ikki at skriva og hjá øðrum er tað øvugt. Hví skulu vit partú generaliserað fólk ? Hví ikki býta flokkin í tvey, í hvørjari einstakari lærugrein ? Soleiðis, at tey, ið ikki eru í miðjuni, kunnu fáa avbjóðingar hóskandi til júst teirra.

Eg havi hoyrt fólk vera ímóti hesi skipan, tí ”tað er so synd”. Mín meining er, at tað er meira ”synd”, at ganga 13 ár í skúla og ikki hava fingið nakað sum helst burtur úr. Antin mugu vit hava frægari lærarar, sum klára at undirvísa øllum, ella eina líknandi skipan, sum áðurnevndu. Tí sum er, er skúlin ikki fyri øll. Bert fyri 8-tøl.



Savnsmynd

MDT INTERNATIONAL

Hósdag og fríggjadag, 8. - 9. mars 2001 kl. 9.00-17.00

Hetta skeið er ætlað leiðarum og starvsfólki í virkjum, sum kunnu hava fyrimun av eini nágreiniliga fatan av kolvetnisleiting, boring og útvinning.
Skeiðið, ið verður hildið á enskum í skeiðshølunum hjá Føroya Sparikassa, varar í tveir dagar.
Tá skeiðið er liðugt, skilja luttakararnir betur

- upprunan til kolvetni
- kolvetnisleiting
- myndugleikar og kolvetnisleiting
- boring eftir olju og gassi
- kolvetnisframleiðslu
- ráoljureinsing
- mál og málnýtslu í kolvetnisvinnuni

Luttakaratalið á skeiðnum er avmarkað til 30.
Kostnaðurin er 6.250,00 kr. íroknað tilfar og mat báðar dagarnar.

Fleiri upplýsingar fáast á heimasíðunum hjá Reveal International, www.reveal.fo, og Føroya Sparikassa, www.sparikassin.fo.

Bindandi tilmelding fer fram hjá Føroya Sparikassa, Julianna Holm Jacobsen, tel 348000.
Luttøkugjaldið verður at flyta til Innlit á konto nr. 9181 132.272.0 í Føroya Sparikassa

FYRILESTRAHALDARAR

TOM JONES

BA, ACIS, stovnari av MDT International, sum veitir oljuvinnuni serskeið og upplæring um allan heim. Fyrrverandi fíggjarleiðari í British Leyland, British Gas Corporation og Conoco



ERIC HUGHES

BSc, PhD. Hevur arbeitt hjá Royal Dutch Shell kring heimin sum toppleiðari innan kolvetnisverkfrøði. Hevur umfatandi royndir í praktiskum, fíggjarligum avgerðum á leiðslustigi.

www.kolvetni.fo

innlit
SKEIÐ • FYRI • VINNULÍVIÐ

INNLIT, sum er eitt samstarv millum Føroya Sparikassa og Reveal International, skipar fyri skeiðum á høgum stigi fyri vinnulívið.

Turið Debes Hentze:

Ein konsert er »frit tilgængelig«

Advokaturin Turið Debes Hentze heldur, at ein almenn konsert er eitt »frit tilgængeligt sted«, og tí hevur ein og hvør loyvi at taka myndir á slíkum støðum. Hinvegin er tað torført at meta um, um talan er um privat viðurskifti

Turið Debes Hentze heldur, at ein konsert kann sigast at vera “frit tilgængelig”, og tí hevur Petur Hansen loyvi at taka myndirnar, sum eru á heimasíðuni

LØGFRØÐI
Stefan í Skorini

Í sambandi við greinina í Sosialinum í gjár um eina heimasíðu, sum vísir ivasamar myndir av fólki í konsert, hava vit fingið orðið á Turið Debes Hentze.

Í paragraf 264 a í revsilógini stendur at lesa, hvar ein hevur loyvi at taka myndir. Lógin sigur, at tann, sum tekur myndir á einum »ikke frit tilgængeligt sted« kann revsar við fongsli ella bót.

Turið Debes Hentze heldur ikki nakrar iva vera um, at ein konsert kann sigast at vera »frit tilgængelig«, og tí hevur ein og hvør loyvi at taka myndir á konsertum.

Tískil ber til at sláa fast, at Petur Hansen hevur loyvi at taka myndirnar, sum hann hevur lagt út á heimasíðu sína, tí frí atgongd er til konsertir í Føroyum.

Aðrir faktorar

Ein annar spurningur er, um hann hevur loyvi at almannakunngera ella »videregive« (sum tað stendur í lógini) hesar myndirnar á heimasíðuni. Hesin spurningur er heldur torførari at meta um, og fleiri ting skulu takast við í metingina av hesum spurninginum, heldur Turið Debes Hentze. Spurningurin er, í hvønn mun persónarnir á myndunum hava verið við til at stilla seg fram til myndatøkuna. Um ein persónur við vilja fegin vil sleppa uppá myndina og sjálvur hevur viðvirkað til, at myndin skal takast, so skal hesin persónurin ikki vænta sær at vinna eitt møguligt rættarmál.

Advokatar tosa um nakað kallað eginskuld, og hon vigar óivað tungt í eini meting hjá dómaranum.

Petur Hansen segði í greinini í gjár, at tey flestu á myndunum sjálv høvdu poserað fyri honum, so hann skuldi taka eina mynd av teimum.

Turið Debes Hentze sigur, at í hesum sambandinum eru tað fleiri ymiskar lógir, sum skulu takast við í metingina, og tá hesar lógirnar kanska stríða hvør ímóti øðrum, er tað torført at siga nakað ítøkiligt um júst hetta málið.

Tað er av stórum týdningi, í hvørjum sambandi verður víst fram, tí tað er ymiskt, hvussu myndir kunnu skiljast í ymiskum umhvørvi.

Nær eru myndirnar tiknar uttan loyvi. Um ein persónur stendur miðskeiðis á dansigólvinum frammanfyri einum myndatóli, so verður tað kanska tulkað sum, at hesin persónurin hevur givið sítt samtykki til at myndin verður tikin.

Hinvegin er tað kanska nakað annað, um myndin er tikin í einum króki uttanfyri, har tvey standa og fríggja burturfrá.

Rætturin skal taka støðu til, hvat kann kallast »privat forhold« og hvat »kan åbenbart unddrages offentligheden«.

Pressufrælsið gerst alt víðari, og myndamaðurin hevur eisini eitt ávíst frælsi at taka myndir á almennum støðum.

Luxembourg - Føroyar

Fótbóltsferð til Luxembourg í mars

Farið verður mikudagin 21/3 kl. 17.30 beinleiðis úr Vágum til Luxembourg og heimaftur leygardagin 24/3 aftaná dystin.

Møguligt er at búgva á 3 hotellum:
• Hotel International
• Hotel Cravat
• Empire Hotel

Hotel International og Empire hotel:
Fyri hvønn í dupult kamar **kr. 5.150.-**
Fyri hvønn í einakamari **kr. 5.995.-**

Hotel Cravat:
Fyri hvønn í dupult kamar **kr. 6.130.-**
Fyri hvønn í einakamari **kr. 8.130.-**

Íroknað í prísin er: Flogferð, innivist í 3 nætur v/morgunmati, busflutningur frá flogvøllinum í Luxembourg til hotel og aftur á flogvøllin, busflutningur og atgongumerki til dystir, ferðaavgjøld og 2 útferðir.

Atlantic Airways

Føroyar: Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur · Tel: +298 333 900 · Fax +298 333 380
e-mail: booking@atlantic.fo · www.atlantic.fo